Dómurin ...

Framhald av 1. síðu.

an veruliga hevur verið á loftí av og á. (H. P. Klein, segði m. a., tá ið *sætt Rubek Nielsen at drukkið um*hann vitnaði: »*Eg havi fleiri ferðir borð*«.) Tá ið L. L. skuldsetir meg sum blaðstjóra á F. S. D., sum hitt einasta av blöðunum, at hava tikið beinleiðis lut í læknastríðnum, og tikið dagar ímillum Halvorsen og R. Nielsen, so er hetta ikki rætt. Vit hava bert vart tað stöðu, ið okkara flokkur á tingi og okkara menn yvir fyri teimum ymisku myndugleikunum hava tikið — alt saman við tí fyri eyga at fáa læknatrætuna loysta. Allir myndugleikarnir hava verið ímóti Norðoyingum, og hetta hevur aftur orsakað, at F. S. D. og flokkur okkara hevur verið fyri hörðum álopum og skuldsetingum frá öllum síðum, og nú verður hetta nýtt fyri at fella meg í hesum máli. — Tað kann ikki verða annað enn öllum pörtum at gagni, at sannleikin kemur fram í hesum máli. T. d. verður Rubek Nielsen at skylda mær tökk, um hann skuldi vunnið sakarmálið og verður reinsaður fyri skuldsetingunum ímóti honum.

Dómurin fellur hósdagin hin 7. oktober kl. 10 f.p.

HAR JAVNAÐARMENN HAVA RÆÐIÐ.

Hin óbeinleiðis skatturin — hjá okkum mest sum bara tollur — rakar so ómetiliga nógv harðast tey við teimum lægstu inntökunum. Sjálvt nógvur tollur hevur mest sum onga ávirkan á tey ríku.

Harí liggur tað órættvísið, ið javnaðarmenn vilja beina fyri. Allar royndir higartil eru kvaldar av sambandsmonnum og fólkaflokksmonnum. At loysingin vil leggja ovurstórar tollbyrðir aftrat á fólkið, er óneyðugt at siga — tað er barnakostur at skilja.

Í teim flestu kapitalistisku londunum er tollurin ovurstórur. Í Svøríki, har javnaðarmenn ráða, er hin óbeinleiðis skatturin bert 27,3 pst av öllum statsinntökunum, bert í einum landi minni.

Av samlaða landsskattinum er hin óbeinleiðis skatturin minkaður í Svøríki, vaksin í öðrum londum. Í 1933—34 var hann 68,9 pst. av samlaða landsskattinum, nú bert 41,1 pst.

Hetta er miðvísur javnaðarpolitikkur til gagns fyri hina arbeiðandi fjöldina.

Kann nakar ræthugsandi og samvitskufullur fiskimaður ella arbeiðari forsvara yvir fyri sær sjálvum og sínum kammirátum ikki at fylkjast um javnaðarstevnuna.

Tá ið fiskimenn á vári 1951 mistu minstuløthings 700 krónur.

Skiparar og fiskimenn stóðu fastir í löntrætuni.

Javnaðarflokkurin setti so fram fyrispurning til landsstýrið, hví stýrið lat standa til og einki gjördi.

Landsstýrið varð kroyst at leggja fram uppskot at avtaka Hákunnarlógina. Men tað og afturhaldssamgongan — *stýðjað av tjóðveldismonnum* samtykti samstundis tvungnan gerðardóm.

Harafturat kom samgongan lúrandi við einum uppskoti um at avtaka lógina um feskfiskasáttmálan fyri dekkarar, kyndarar og kokkar.

Henda lógin gav sum kunnugt fiskimonnum tryggjan fyri at fáa 700 kr. í minstulön fyri túrin, uttan mun til, hvat ið túrarnir frammanundan ella aftaná góvu.

Fiskimannafelöginí mótmæltu harðliga.


Og javnaðarmenn bardust sjálvandi av heitum huga ímóti afturhaldsins uppskoti um avtöku av hesi lóg, sum teir hövdu fingið samtykta í síni tíð.

Men einki bætti.

Fiskimenn *máttu niður í hýru*, ella megu skipini liggja, sögdu *Thorstein Petersen, Martin Holm, Jens Kristian Olsen, A. Sörensen.*

Neyðar fiskimenn, sum við valborðið seinast hava givið hesum biksvarta afturhaldi höví til at kvörkra fiskimannastattina soleiðis sum hendi henda dagin á tingi.

VELJIÐ C



Skipafelagið Føroyar

Telefon 1225

Tórshavn

Tórshavnar tekniski skúli

byrjar dagskúla fyri handverkarar fyrst í november.

Næmingar, ið ætla at vitja skúlan, biðjast venda sær til undirritaða.

Kvøldskúlin byrjar mánakvöldið 4. oktober kl. 10.00.

Johan Ziska, tlf. 1957.

Føroya maskinistfelag.

Föroya maskinistfelag hevur ársaðalfund um mánaðarskiftí oktober—november við hesi dagsskrá:

1. frágreiðing frá farna árinum.
2. val av nevnd, grannskoðarum og tiltaksmonnum.
3. sildarsáttmálin.
4. ymist.

Allir limir eiga at möta. Tíð og stað verður lýst seinni.

NEVNDIN

JÓLASTJØRNAN 1954.

Listar verða nú bornir í hús um alt landið, har fólk kunnu tekna seg fyri JÓLASTJÖRNINA, sum kemur út um 1. desember. Bókin verður í ár betri enn nakrantíð til innhalds, og eisini eru

PREMIUKAPPINGAR

í henni, har vinnast kunnu 100, 50 og 25 kr., og börnunum stendur EITT SKÚLAUR til vinningar.

Norrøna Forlagið.

KOMFIRMATIÓNSTELEGRAMM

Fólk, ið vnskja at senda telegramm til komfirmantar í Havn sunnudagin 3. oktober, biðjast gera so væl at telefonera ella flíggja tey inn leygardagin ella sunnudagin fyri middag. Telegramm ið koma inn aftaná kl. 17. sunnudagin kunna ikki vantast at verða útborin sama dag.

(Telefonstöðin er opin hvönn dag frá kl. 8—22)

Hvørji eru sjómarkini?

Ymist er, hvussu tey ymisku londini kring um heimin hava sett sær sjómarkið. Vit nevna her nökur dömi:

4 fjórðingar: *Finland, Noreg, Svøríki* og í lötunj *Ísland.*

6 fjórðingar: *Grikkaland, Italia, Spania, Turkaland* og *Uruguay.*

10 fjórðingar: *Jugoslavia.*

12 fjórðingar: *Bulgaria, Egyptaland, Rumenia* og *Sovjetsamveldið.*

Aftaná seinasta heimsbardaga hava fleiri lond lógfest teirra jurisdiktión yvir meginlandagrunnin, t. v. s. partvís bert sjálvan landgrunnin *til oljuframleiðslu* o. s. fr., partvís í samband við havökið á landgrunninum.

Dömi um fyrra flokkin eru *U. S. A.* og *Ongland.* Ongland hevur »friðað« öki í persisku víkini og við oyggjarnar *Bahama* og *Jamaica.*

Dömi um seinra flokkin eru *Argentina, Costa Rica, Honduras, Ísland, Nicaragua* og *Panama.*

Seinasta hava *Chile Peru, Honduras* og *El Salvador* í samband við nátúrikidömi sagt frá, at teirra jurisdiktión rökkur 200 fjórðingar til havs.

EIN MØTTI

Á Sandi varð herfyri lýst til fólkaflokksfund. Heitt var á allar áhugaðar fólkaflokksmenn um at koma á fund fyri at velja umboðsmenn til landsfund flokksins í Havn. Bert fundarinnbjóðarin mötti. Ein annar maður kom upp á trappuna, men steig ongantíð innum.

Hvat er ein kenning?

Um orðini *berúsaður, drukkin* og *at kenna til* kann eg siga hetta:

Berúsaður er ikki gamalt orð í föroyskum, merkingin má vera sum tann, danska orðið *beruset* hevur; *drukkin* hevur sonn merking sum danska orðið *drukken*, t. e. »som er i höj grad paavirket af stærke drikke, (stærkt) *beruset, fuld*« (sí »Ordbog over det danske Sprog« III, 1019). *At kenna til* er væl minni enn at »vera drukkin« og verður nýtt um »en lettere rus«.

Keypmannahvn, 31. aug. 1954.

Chr. Matras.